# KÍ

**Klaksvíkar Ítróttafelag**
FO-700 Klaksvík
www.ki-klaksvik.fo

**STOVNAÐ**
24.08.1904

**FORMAÐUR**
Nichels Lützen

**MEISTARAR (17)**
1942, 1945, 1952, 1953, 1954, 1956, 1957, 1958, 1961, 1966, 1967, 1968, 1969, 1970, 1972, 1991, 1999

**STEYPAVINNARAR (5)**
1966, 1967, 1990, 1994, 1999

**GREIPUVINNARAR (3)**
1966, 1967, 1999

**Í 1. DEILD (65 ár)**
1942-1943, 1945-

**Í EUROPA (8)**
Meistarakappingin 1992/93, 2000/01
Steypavinnar 1995/96
UEFA Cup 1997/98, 1999/00, 2002/03, 2003/04
Intertoto 2007/08

# Skulu finna seg sjálvar í Klaksvík

## Fleiri ungir spælarar standa á gáttini til besta KÍ liðið, har Eyðun Klaksvík, sum hevur vant fleiri av yngru liðunum, hevur ábyrgdina

Tað hevur seinnu árini verið langt millum FM heitini hjá sigursvandu klaksvíkingunum. Átta ár vóru frá fyrsta FM heitinum í nítjan ár í 1991 og til næsta FM heitið í 1999, og nú er longri tíðarskeið runnið enn so, uttan at KÍ hevur vunnið gull.

Seinastu árini hevur ungdómsfótbólturin verið væl skipaður, og nú ber hetta úrslit við sær. Eyðun Klakstein og Trygvi Mortensen tóku ábyrgdina á seg, eftir at fyrri partur av kappingarárinum í fjør hevði verið órudduligur. Tað sást skjótt, at klaksvíkingar framvegis duga at spæla fótbólt, hóast úrslitini kundu havt verið betur.

Eyðun Klakstein hevur í fleiri ár verið ungdómsvenjari, og fleiri av gávuríku ungu spælarunum trýsta nú á fyri at sleppa upp í part. Eitt nú hava John Hammer og Álvur F. Christiansen gjørt seg galdandi í venjingardystum.

19 ára gamli Kristoffur Jakobsen hevur síðsta lítla árið verið í rúkandi menning sum spælstýrari, og 16. mars var hann fyrstu ferð á landsliðnum. Umframt hesar tríggjar eru einir sjey, sum eru 20 ár og yngri, við í kappingini.

At Jákup Mikkelsen er aftur í Klaksvík er stórur styrkur. Fleiri aðrir veteranar eru framvegis við: superveteranurin Harley Bertholdsen, miðverjarnir Ove Nysted og Jan Andreasen og síðuspælarin Heðin á Lakjuni eru teir mest royndu.

1983 var í fleiri ár mettur at vera besti árgangurin. Atli Danielsen og Hjalgrím Elttør eru burtur, og teir einastu av árganginum, sum framvegis spæla við KÍ, eru miðvallararnir Símun Joensen og Kristian á Lakjuni. Hesin seinni hevur fyri fyrstu ferð í fleiri ár verið við í øllum fyrireikingunum og tykist vera heilt væl fyri.

Klaksvíkingar hava fingið sær hjálpt frá hugflogsríka síðuspælaranum Bjarna Jørgensen, sum í fjør var í AB eftir fleiri ár á Skála, frá serbanum Milan Curcic, sum í fleiri ár hevur verið dugnaligur verjuspælari á Skála, og frá brasilsku Rodrigo og Anderson, sum tað hevur verið ætlanin skulu taka sær av fremstu leiklutunum. Ætlanin var, at argentinski Tridente skuldi vera fremsta álopsvápnið, men tað kiksaði. Nú verður spurt í Klaksvík, um teir báðir brasiliumenninir eru rættuligir álopsspælarar, ella um teir eru framrættaðir miðvallarar.

Fyri KÍ er tað týdningarmikið, at nýggju menninir megna at fáa tyngd í álopspartin, sum er nógv skerdur, tí bæði Paul Clapsson og góði Denni Conteh eru burtur.

Avrikini í venjingardystunum hava verið sera misjøvn, og tað er stór avbjóðing hjá venjarunum at lyfta botnstøðið. Tað ræður um hjá spælarunum og liðnum støðugt at finna seg sjálvar og góðu evnini.



*Takið hjá KÍ er nú at vinna seg upp aftur í føroyska fótbóltsoddin, har klaksvíkingar halda seg eiga sjálvskrivaðan leiklut*

**MÁLMENN**

| | |
|---|---|
| Jákup Mikkelsen | 14.08.70 |
| Mathias Samuelsen | 31.01.88 |

**VERJA**

| | |
|---|---|
| Sigmund Jacobsen | 03.02.88 |
| Jan Andreasen | 14.11.72 |
| Harley Bertholdsen | 10.03.69 |
| Milic Curcic | 26.01.81 |
| Ove Nysted | 30.03.80 |
| Ári Samson | 09.06.89 |
| Dánial Pauli Lervig | 26.04.91 |
| Jógvan Isaksen | 25.04.90 |

**MIÐVØLLUR**

| | |
|---|---|
| Símun Joensen | 12.07.83 |
| Kristoffur Jakobsen | 07.11.88 |
| Kristian á Lakjuni | 18.01.83 |
| Leon Bjartalíð | 13.09.80 |
| John Hammer | 17.02.89 |
| Eli Simonsen | 03.09.90 |
| Tórður Lervig | 18.05.85 |
| Anderson | 15.04.80 |

**ÁLOP**

| | |
|---|---|
| Rodrigo | 16.11.82 |
| Jósup Henriksen | 06.10.85 |
| Heðin á Lakjuni | 19.02.78 |
| Álvur F. Christiansen | 29.05.89 |
| Bjarni Jørgensen | 29.08.04 |
| Steffan Kalsø | 08.09.87 |

**VENJARI**
Eyðun Klakstein

**HJÁLPARVENJARI**
Trygvi Mortensen

**FRÁGONGD**

| | |
|---|---|
| Meinhardt Joensen | B36 |
| Høgni Madsen | ÍF |
| Kaj Ennigarð | Víkingur |
| Denni Conteh | Slagelse |
| Paul Clapson | Afturelding |
| Gunnar Nielsen | |

**TILGONGD**

| | |
|---|---|
| Jákup Mikkelsen | B36 |
| Bjarni Jørgensen | AB |
| Milic Curcic | Skála |
| Rodrigo | Brasil |
| Anderson | Brasil |
| Jósup Henriksen | B68 |
| Tórður Lervig | ÍF |